


GRAFIK STUDIO

# Verkætlanarstarv til undirvísingar-portalin

## Spennandi verkætlanarstarv at menna undirvísingarportalin Snar

Føroya Skúlabókagrunnur søkir starvsfólk til undirvísingarportalin Snar.fo. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2008 til 1. september 2009 við møguleika at halda fram.

Snar.fo er verkætlan at menna ein undirvísingarportal, har teldutøkt tilfar verður savnað og skipað til skúlaverkið. Verkætlanin er samstarv millum Mentamálaráðið, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag. Føroya Skúlabókagrunnur umsitur verkætlanina, sum byrjaði á heysti 2006. Ein verkætlanarbólkur við umboðum frá Skúlabókagrunninum, Landsmiðstøðini, KT-deplinum og Fróðskaparsetrinum arbeiðir við menningini av undirvísingarportalinum, sum alment fer at virka komandi ársskifti.

### Ábyrgdarøki

Sum starvsfólk verður tú við í verkætlanarleiðsluni, har títt ábyrgdarøki m.a. verður at samskipa mongu netútgávurnar frá ritstjórum og stovnum. Tú fert dagliga:

- at virka fyri samstarvi við stovnar og einstaklingar um fjølbroytt og tíðarhóskandi tilfar til portalin.
- at samskifta við veitarar, skipa samstarvsbólkar og skjalfesta mongu arbeiðsuppgávurnar.
- í tøttum samstarvi við verkætlanarbólkin at raðfesta útgávur, menna skipanina, seta hana í verk og kunna lærarar og almenningin um áhugavert tilfar til læring.

### Førleikar

Vit hugsa okkum, at tú helst hevur:

- læraraprógv ella samsvarandi útbúgving og royndir frá skúlaverkinum.
- stóran áhuga og kunnleika til teldur, netsamskifti og teldutøkt undirvísingartilfar.
- góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymum.
- evni til nýhugsan og menning.
- evni at skapa góð sambond við starvsfólk og viðskiftafólk.

### Starvs- og lønarviðurskifti

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag ella avvarðandi yrkisfelag, og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag er starvið lønt í lønarflokki 30-1. Starvið er tíðaravmarkað og klárt at seta frá 1. august 2008.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2008.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Niels Petersen, stjóra, ella Wenche Andreassen, leiðara av portaltoyminum, á tlf. 316100.

Føroya Skúlabókagrunnur er eitt alment forlag, sum skipar fyri at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til tað føroyska skúlaverkið. Undirvísingarmiðlar, ið eru í samsvari við tað regluverk og tær lesiætlanir, ið eru galdandi fyri undirvísingarverkið. Í 2008 starvast 10 fólk á forlagnum, men stovnurin er í støðugum vøkstri.

Ritstjórarnir á Skúlabókagrunninum eru eitt toymi, sum arbeiðir saman um at útvega dygdargóðar føroyskar undirvísingarmiðlar. Tað merkir, at neyðugt er at samstarva við bæði starvsfelagar og mong onnur til tess at tryggja so stórt fjølbroytni sum møguligt, námsfrøðiliga dygd og breidd, tíðarhóskandi málsligan búna, og at útsjónd og "layout" styðja endamálið við útgávuni.

Skúlabókagrunnurin hevur ábyrgd av einum nýggjum føroyskum undirvísingarportali. Ritstjórarnir eru við í arbeiðinum at menna henda portal og at útvega eitt hóskandi úrval av talgildum miðlum. Ein partur av starvinum er eisini at veita lærarum og øðrum neyðuga kunning um føroyskar undirvísingarmiðlar.

Nærri kunning um Skúlabókagrunnin er at finna á heimasíðuni: www.fsg.fo.

**Føroya Skúlabókagrunnur**

Lützenstrøð 4 • 100 Tórshavn • Tel 316100 • Fax 318726 • www.fsg.fo